

## Verkstaðsfólk (endurlýsing)

Av tí at okkara dugnaliga verkstaðsfólk hevur valt at taka við nýggjum avbjóðingum, verður søkt eftir verkstaðsfólki til nýmótans verkstað kommununnar.

Á verkstaðnum, ið er knýtt at sløkkiliðsstøðini, starvast í løtuni seks fólk, ið hava ábyrgd av øllum maskinum og akførum hjá kommununi. Talan er um umleið 100 rullandi eindir.

**Vit bjóða**
Eitt starv við nógvum ymiskum arbeiðsuppgávum í einum sera spennandi umhvørvi. Góðar arbeiðsumstøður á einum verkstaði við góðari útgerð.

**Arbeiðsuppgávur**
Nakrar av høvðusuppgávunum hjá verkstaðsmanninum verða m.a.

- umvæling av maskinum, bilum, tólum o. t.
- annars vanligt verkstaðsarbeiði

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at viðkomandi hevur útbúgving sum bil/lastbil-mekanikari, maskinsmiður e.l.

Neyðugt er, at tann, ið settur verður, hevur førarabræv til akfar yvir 3500 kg., er handaligur, hevur prógv innan onkra av nevndu útbúgvingum og hevur fyrstahjálparprógv.

Nevnda koyrikort og fyrstahjálp kann takast innan seks mðr. eftir setan.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er mánaðarlønt eftir sáttmála millum Landsfelag Handverkaranna og Fíggjarmálaráðið, og verður sett skjótast til ber.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Gullak Poulsen, virkandi verkstaðsleiðara, ella Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, á tlf. 30 21 00.

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 19. oktober 2007 kl 12.00. Merk umsóknina „Verkstaðsfólk".

**Tórshavnar kommuna**




## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 27. september 2007 samtykti broyting í setstøku byggisamtyktini fyri Hvítanes.

Ætlaða broytingin er, at eitt økið uppá uml. 20.000 $m^2$ norður frá Gerðisvegi á Hvítanesi verður broytt frá landbúnaðarøki til B-sethúsaøki.

Broytingin umfatar partar av matr. nr. 98, 102b, 107, 110, 94, 93 og litra t.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 8. til og við 29. oktober 2007, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 8. januar 2008.

**Tórshavnar kommuna**

# U21 EM-landsdystir




**FØROYAR-AZERBAJAN**
**Leygardagin 13. oktobur 2007**
**Kl. 11.00 á Tofta Leikvølli**

&

**FØROYAR-KROATIA**
**Mikudagin 17. oktobur 2007**
**Kl. 15.00 á Tórsvølli**

Atgongumerkju kunnu keypast við inngongdina

| | | |
|---|---|---|
| Kostnaður: | Børn og ung 0-16 ár | ókeypis |
| | Ung og vaksin 17 ár og eldri | kr. 100.00 |

Ung og vaksin við atgongumerki frá dystinum Føroyar-Frakland hava ókeypis atgongd

creð 458006